Bárður á Steig Nielsen
Helgi Abrahamsen
Magnus Rasmussen
Johan Dahl
Erhard Joensen
Eyðdis Hartmann Niclasen
Frimodt Rasmussen
vegna Sambandsflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Hækking av barnafrádráttinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 30. apríl 2025 verður í § 2, stk. 1, 1. pkt. "kr. 9.200" broytt til: "kr. 13.200" og "kr. 6.500" broytt til: "kr. 10.500".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Almennar viðmerkingar
Kostmiklari gerandisdagur rakar barnafamiljur í Føroyum serliga hart. Prísir á matvørum og øðrum gerandisvørum, umframt høgir bústaðarprísir, gera tað trupult at fáa endarnar at røkka saman.

Fíggjarliga byrðan ger dagligdagin hjá barnafamiljum truplari; tí vil Sambandsflokkurin við hesum lógaruppskotinum tryggja betri livi kor hjá barnafamiljum í Føroyum.

Í Føroyum hava vit eina demografiska avbjóðing, tí tað gerast fleiri eldri borgarar, meðan yngri borgarar í barnsburðaraldri vanta. Fyri at betra um livikorini hjá barnafamiljum í Føroyum, umframt at betra um gerandisdagin hjá borgarum, ið vilja ella ætla sær at seta búgv og stovna familju í Føroyum, krevjast fíggjarlig átøk til hetta.

Uppskotið hækkar barnafrádráttin fyri hvørt barnið við 4.000 kr.

Landið letur í dag ein frádrátt í landsskattinum fyri hvørt barnið. Fyri børn 0-6 ár er frádrátturin 9.200 krónur og fyri børn 7-17 ár er frádrátturin 6.500 kr.

Endamálið við uppskotinum er at geva ein frádrátt, ið er beinleiðis tilætlaður barnafamiljum, sum fer at betra munandi um gerandisdagin.

Við uppskotinum verður frádrátturin fyri børn undir 7 ár hækkaður úr 9.200 kr. upp í 13.200 kr. og fyri børn millum 7 og 17 ár hækkaður úr 6.500 kr. upp í 10.500 kr.

Avleiðingarnar av uppskotinum

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Á leið 13.000 børn eru í Føroyum. Í aldrinum 0 til 6 ár eru á leið 5.000 børn, og í aldrinum 7 og 17 ár eru á leið 8.000 børn.

Við at hækka barnafrádráttin við 4.000 kr. fyri hvørt barnið, hækkar samlaði frádrátturin í landsskattinum við 52 mió. kr. um árið. Roknast kann við, at ein partur kemur inn aftur í øðrum avgjaldsinntøkum, tí hesin peningur kemur í umferð, so nettokostnaðurin er helst á leið 40 mió. kr. um árið.

Saman við hesum uppskotinum verður eisini lagt fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot, sum hevur sum endamál at steðga ætlaðu niðurlaðingini av ríkisveitingini, og at ríkisveitingin frá og við 2025 verður tann sama sum í 2024. Lækkingin av ríkisveitingini fyri 2025 er 25 mió. kr., og uppskotssetararnir mæla eisini frá at lækka ríkisveitingina fyri 2026, soleiðis sum samgongan skjýtur upp í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026.

Omanfyri nevnda uppskot um at strika lækkingina av ríkisveitingini í 2025 og í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 er sostatt við til at fíggja hetta uppskotið um hækking av barnafrádráttinum.

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar.

Serligar viðmerkingar

Til § 1

Frádrátturin fyri børn undir 7 ár hækkar úr 9.200 kr. upp í 13.200 kr. Frádrátturin fyri børn millum 7 og 17 ár hækkar úr 6.500 kr. upp í 10.500 kr.

Til § 2

Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 4. november 2025

Bárður á Steig Nielsen	Helgi Abrahamsen	Magnus Rasmussen
Johan Dahl	Erhard Joensen	Eyðdis Hartmann Niclasen
	Frimodt Rasmussen	